# NSÍ er sætti vinnarin



**Steypasigrarnir hava seinastu árini verið meiri javnt býttir millum feløgini, enn teir vóru tey fyrru árini, tá HB vann nógv oftari enn hini feløgini**

STEYPAHAGTØL
*Jóannes Hansen*

HB er framvegis mest vinnandi steypafelagið, men nú eru havnarmenninir ikki heilt so sannførandi, sum teir áður hava verið. Tað siga tølini.

Av teimum 48 finalunum, sum hava verið spældar síðani 1955, hevur HB vunnið 25. Tað hevur verið kappast um løgmanssteypið síðani 1989. Sigurin sunnudagin var tann fyrsti hjá NSÍ, sum er sætta felagið, ið hevur havt løgmanssteypið í skápinum. HB hevur vunnið fýra ferðir, KÍ og GÍ tríggjar ferðir, B36 tvær ferðir, og B71 og NSÍ eina ferð í part.

### Løgmanssteypið 1989–2001

**1989**
B71–HB 0–0
B71–HB 0–2: Oddbjørn Joensen, Gunnar Mohr
**1990**
GÍ–KÍ 1–6: Per Dalheim – Beinur Poulsen, Kurt Mørkøre, Olgar Danielsen, Allan Mørkøre br, sjálvmál, Todi Jónsson
**1991**
B36–HB 1–0: Bergur Magnussen –
**1992**
HB–KÍ 1–0: Gunnar Mohr
**1993**
B71–HB 1–1: Páll á Reynatúgvu – Rúni Nolsøe
B71–HB 2–1: Torbjørn Jensen, Páll á Reynatúgvu – Hans Petur í Brekkunum
**1994**
B71–KÍ 1–2: Eli Hentze – Jákup Mikkelsen br, Arnold Joensen
**1995**
B68–HB 1–3: Aksel Højgaard – Rúni Nolsøe, Andreas F. Hansen, Eyðun Samuelsen
**1996**
GÍ–HB 2–2: Henning Jarnskor, Símun Petur Justinussen – Hallur Danielsen, Petur Slyne
GÍ–HB 2–2, 5–3 eftir longda leiktíð: Rúni Justinussen (2), John Petersen, Símun Petur Justinussen, Agnar Højgaard – Uni Arge (2), Hallur Danielsen
**1997**
GÍ–VB 6–0: Sámal Joensen, Henning Jarnskor (3/1br), Pauli Jarnskor, Øssur Hansen –
**1998**
HB–KÍ 2–0: Hans á Lag, Andrew av Fløtum –
**1999**
B36–KÍ 1–3: Jens Kristian Hansen – Rógvi Jacobsen, Kurt Mørkøre, Arnold Joensen
**2000**
GÍ–HB 1–0: Óli Hansen –
**2001**
B36–KÍ 1–0: Jens Kristian Hansen –
**2002**
HB–NSÍ 1–2 (1–0)
Rógvi Jacobsen – Ulrik Balling, Brynjolvur Nielsen



Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:

1. Tøm Miklagarð
Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú ført stundir til ... men bara eitt av hvørjum.



2. Dreymaferð við nýggju Norrönu
Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




Ja eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn
Bústaður
Býur/bygd
Tel
e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720